LANDSPÍTALI
HÁSKÓLASJÚKRAHÚS

# Viðgerð við nýrasteinsknúsara í narkosu/ doyving

## Vegleiðing um tíðina áðrenn og aftan á innlegging

Endamálið við viðgerð við einum nýrasteinsknúsara, er at bróta/ knúsa nýrastein/-ar, sum hava gjørt um seg í nýrunum og/ ella í land-vatnræsinum. Viðgerðin verður ikki gjørd hjá kvinnum, ið eru við barn.

## Fyrireiking til viðgerðina

Tekur tú blóðtynnandi heilivág, er neyðugt at gevast í eitt ávíst tíðarskeið, áðrenn viðgerðin fer fram. Hetta verður gjørt í samráð við sjúkrarøktarfrøðing.
Dagin fyri viðgerð, er bert loyvt at eta morgunmat. Síðan er ikki loyvt at fáa sær aðra føði enn flótani føði. Tú mást ikki eta ella drekka aftan á midnátt. Mælt verður til, at tá tú verður útskrivað/-ur, skal búgvið fólk fylgja tær. Tú mást ikki koyra bil ella annað akfar sjálv/-ur. Hugsandi er, at heilivágurin ið tú tekur undir og eftir viðgerðina, kann ávirka koyriførleikan.

## Viðgerðardagurin

**Tú verður biðin um at møta í myndatøku á Røntgendeildini, sum húsast í kjallaranum á Landspítalið við Hringbraut. Beint eftir myndatøkuna, skalt tú møta á gongudeildina 11 A 1 hædd, har viðgerðin verður framd.**
Viðgerðin fer fram, meðan tú ert í narkosu/ doyving, og tekur uml. 40 til 60 minuttir, alt eftir, hvar nýrasteinur/steinar er/u staðsettur/ir. Undir viðgerðini verður pínuheilivágur givin í eina æðr. Píniheilivágurin verðu givin eftir tørvi hjá hvørjum sjúklingi sær. Tú fært hjálp við, at leggja teg til rættis á eitt viðgerðarborð. Síðan verða ultraljóðbylgjur sendar út til at bróta/ knúsa nýrasteinin/arnar. Viðgerðarborið verður bloytt við einum færra av vætu. Hetta verður gjørt fyri, at økja um førleikan hjá bylgjunum. Væta verður givin í eina æðr. Blóðtrýst, hjartasláttur og súrevni verða mátað. Aftan á viðgerðina, verður tú flutt/-ur til eina viðrakningarstovu, har tú kann koma fyri teg, áðrenn tú verður flutt/ ur aftur á 11A. Tú verður útskrivað/-ur sama dag í viðgerðin verður gjørd.

**Set teg í samband við Gongudeildina ella Bráðfeingismóttøkudeildina. Í Føroyum ber tað til at seta seg í samband við kommunulæknan.**
- Um tú fært hægri fepur enn 38°
- Um pínan heldur fram, hóast tú tekur heilivág fyri pínu

## Útskriving

### Pína

Eftir, at tú ert heimkomin, kanst tú fáa pínu. Orsøkin til tess kann vera, at steinurin ella brot úr steininum ganga niður í landbløðruna. Um so er, skalt tú minka um inntøkuna av vætu. Ov nógv væta kann elva meira pínu. Sum oftast hjálpir tað at taka pínulinnandi heilivág, ið kann keypast á apotekinum.

### Væta

Fyrstu dagarnar eftir viðgerðina er umráðandi, at tú drekkur nógv av vætu, uml. 2 litra um dagin.

### Vatnlát

Viðhvørt sæst blóð í landinum, teir fyrstu dagarnar eftir viðgerðina, men hettar gongur yvir.

### Arbeiði

Aftan á, at tú ert heimkomin, er umráðandi at hvíla og bert taka tær av løttum.

Gongudeildin 11A húsast á 1. hædd í Landspitalið við Hringbraut. Deildin er opin gerandisdagar frá kl. 8:oo til 16:00, tlf 543-7100. Aftan á afturlatingartíð, skal ringjast til Bráðfeingismóttøkudeildin á Landspítalið í Fossvogi, tlf 543 2000.
**Um tú ella ein av tínum avvarðandi hava spurningar, eru tit vælkomin til at ringja**

Vinarliga hav í huga, at sjúkrahúsið ikki tekur ábyrgd av peningi ella øðrum virðislutum, so sum fartelefonum, teldum o.ø., sum sjúklingurin ella avvarðandi hava við sær. Gevið gætur, at starvsfólk og næmingar á sjúkrahúsinum eru bundin av tagnarskyldu og mugu tí ikki tosa við teg ella onnur um viðurskifti hjá sjúklingum á deildini. Tí biðja vit teg og avvarðandi tíni um ikki at tosa um tað, sum tit kunnu vera vitni til ella hoyra um aðrar sjúklingar á deildini.

ÚTGEVARAR: LANDSPÍTALI SKURÐLÆKNINGASVIÐ
ÞÝÐING: MAJBRITT VESTERGAARD HØNNUN: KYNNINGARMÁL LSH/ÁJC